Kommunufelagið

VINNUMÁLARÁÐIÐ
TINGANES
POSTBOX 377
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
29. januar 2015

Okkara j.nr.
15/00391-2

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.

**Viðv. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um hýruvognskoyring**

Vinnumálaráðið hevur 16 januar sent Kommunufelagnum uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um hýruvognskoyring, til hoyringar. Hoyringsfreistin er ásett til 29. januar 2015.

Felagið tekur sum heild undir við uppskotinum. Kortini má felagið staðfesta, at avleiðingin av uppskotinum verður, at regulering nú verður av ferðafólkaflutningi í akførum upp til 12 ferðandi og frá 18 ferðandi og upp eftir, men ongin regulering av akførum við millum 12 og 18 ferðandi. Felagið undrar seg yvir, hví ætlanin ikki er at hava skipaði viðurskifti fyri henda bólk.

Harumframt hevur Kommunufelagið eina viðmerking, sum ikki hevur beinleiðis við innihaldið í fyriliggjandi lógaruppskoti at gera. Tað eru kommunur, sum hava ynskt at seta standard hýruvognsreglugerðina í gildi fyri kommununa, men ikki hava fingið hetta játta, tí Vinnumálaráðið hevur boðað frá, at alt hýruvognsøkið verður endurskoðað. Við hesum lógaruppskotið gongur Kommunufelagið út frá at økið er endurskoða, og at tær kommunur, sum ynskja tað, fáa sett standard hýruvognsreglugerð í gildi fyri kommununa.

Vegna

Kommunufelagið

| | |
|---|---|
| Heðin Mortensen<br>Formaður | Eyðun Christiansen<br>Stjóri |

**R. C. Effersøesgøta 30 · Postboks · 53 FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · Fax +298 302481 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**